## Viðmerking:

## Linari revsing

Siti her og ræðist at ganga úti í hesum myrku tíðum, tað verður koyrt alt ov skjótt og hart, og ikki er betur at vita, at summi koyra ávirkaði.

Og haldi samstundis at fólk, ið koyra ávirkaði og/ ella ov skjótt fáa alt ov lina revsing. Fyri at koyra fólk niður og fólk kemur til skaða ella letur lív er straffurin alt ov linur. Og nú mundi eg dottið á reyvina at hoyra, Javnaðarflokkurin vil hava, at straffurin skal gerast linari - heldur Javnaðarflokkurin veruliga, at tað er í fínasta lagi, at fólk koyra ávirkaði?

Tað manglar bara, at tey fáa ein premiu fyri at koyra ávirkaði!

Ikki haldi eg, at tit klára tykkum væl í andstøðu, og um hetta er tykkara máti at náa veljaranum - Gud forbarmi okkum.

*Vinarligast*
**Rói á Rógvu Joensen**

## Persónsmál

*Aðalstjórin í Almanna- og Heilsumálastýrinum heldur málið um uppsøgnina av Jákupi Mørkøre vera eitt persónsmál*

John Johannessen

Fyrrverandi sjúkrahússtjórin og núverandi aðalstóri fyri Almanna- og Heilsumálastýrið, Høgni Joensen, vil ikki gera stórvegis viðmerkingar til málið um uppsøgnina av Jákupi Mørkøre, sjúkrahúsleiðara.

Hann heldur, at talan er um eitt persónsmál, og tí er skeivt at fara út í fjølmiðlarnar við viðmerkingum til málið.

Høgni Joensen hevur sjálvur havt ein stóran leiklut í rokinum um Landssjúkrahúsið. Hann hevur nevniliga, sum aðalstjóri fyri Almanna- og Heilsumálastýrið, verið samskftismiðil millum sjúkrahúsleiðaran og landsstýriskvinnuna. Hetta síggja vit í skjølum, Jákup Mørkøre hevur skrivað, ið viðgera samskifið um sparingarnar og uppsagnir á Landssjúkrahúsinum

Jákup Mørkøre slær fast, at hann fleiri ferðir kunnaði aðalstjóran um avleiðingarnar av kravdu sparingunum somuleiðis, sum hann bað um at sleppa at kunna landsstýriskvinnuna um tað sama. Men sambært skjølunum frá Jákupi Mørkøre var svarið frá Høgna Joensen, at landsstýriskvinnan var fult kunnað, og tí nýttist sjúkrahúsleiðarin ikki á fund við landsstýriskvinnuna.

Men Helena Dam á Neystabø hevur í fjølmiðlunum fleiri ferðir seinastu dagarnar meldað út, at hon einki visti um 27 uppsagnir á Landssjúkrahúsinum. Tískil eru ábendingar um, at aðalstjórin, Høgni Joensen, ikki hevur kunnað landsstýriskvinnuna, hóast hann vissaði Jákupi Mørkøre um hetta.

Um hetta er rætt ella ikki, vil Høgni Joensen heldur ikki gera viðmerkingar til.

Aðalstjórin í Almanna- og Heilsumálastýrinum hevur fyrr siti í líknandi sessi, sum Jákup Mørkøre, tá hann í trongu tíðunum var stjóri fyri øll trý sjúkrahúsini, og sum Sosialurin skilir, metir hann tað ikki sum nakra lætta uppgávu at reka Landssjúkrahúsið.

## Aftur bókaútsøla

*Stóra skipaða várútsølan av føroyskum bókum verður í døgunum 27. mars – 6. mai 2000*

Í 1988 varð fyrstu ferð skipað fyri útsølu av føroyskum bókum. Bókhandlarafelagið og Bókadeild Føroya Lærarafelags skipaðu fyri - og hetta var stórhending tá. Nú vóru so nógvar føroyskar bøkur, at til bar at skipa fyri rimmar útsølu við fleiri hundrað bókum.

Men tað er kortini greitt, at føroyski bókamarknaðurin er somikið avmarkaður, at tað ber ikki til at halda útsølu hvørt ár. Tí er føroysk bókaútsøla bara 3. hvørt ár - og bøkurnar, ið verða seldar á útsølu, skulu í minsta lagi vera 3 ára gamlar. Tá ið tær hava verið á tveimum útsølum, sleppa tær ikki við aftur.

Nú er so aftur bókaútsøla á skránni í døgunum 27. mars til 6. mai. Bókadeildin sendir í hesum døgum bræv til øll forløg, har boðað verður frá hesum og greitt verður frá treytunum at sleppa upp í part. Lýsing verður eisini sett í bløðini, so fólk, ið kanska eiga bøkur, sum stigtakararnir ikki vita um, kunnu gera vart við seg.

Stór útsøluavís verður prentað og send í øll hús í landinum nakrar dagar, áðrenn útsølan byrjar. So kunnu fólk í frið og náðum kunna seg við útsølubøkurnar.

# Kappingaravlaging

*Í seinastuni hevur verið nakað av tjaki um Føroya Realkreditstovn og serliga um umsiting hansara av sokallaðu gjaldførislánunum frá Føroya Landsstýri. Hetta tjak hevur verið merkt av skeivleikum og misskiljingum, tí biðja vit blað tygara hýsa hesi frágreiðing frá okkum stjórum í Realkreditstovninum:*

Virksemi Realkreditstovnsins er sera nágreiniliga avmarkað við lóg. Uppgávan er at veita frægast møguligu fíggingina til føroyska veiðuflotan, og vil tað siga so bíliga fígging sum gjørligt uttan at stovnurin setur til viks krøvini um eina varisliga virðismeting, ein varligan langtíðarpolitikk við so jøvnum rentustøði, sum gjørligt, og eina forsvarliga fyrisiting, so kostnaðarlítla sum gjørligt.

Á stovninum hvíla ongi krøv um at røkka hægst møguligu yvirskotunum ár um ár, men javnt og samt vaksa um eginognina í væl tryggjaðum rakstri, sum einans hevur trygd í „Realum“ virðum - harav navnið. Herí liggur, at ikki skal takast eykatrygd í húsum, traðum, hjøllum, neysti/ ella báti, sølufeløgum ella bankabókum hjá teim fólkum, sum standa fyri verkætlanum um útvegan av flótandi veiðu- ella virkisamboði, men bert trygd í tí „Reala“ virði, sum sjálvt amboðið hevur.

Verunliga stovnsfæið til sjálvsognarstovnin Realin bygdi á tilsøgn um 8 mill.kr. av Marshallhjálpini, sum USA veitti Europa eftir kríggi. Hesin peningur skuldi tó fyrst nýtast til útbygging av El-orkuni, og bleiv so næstu 17árini so við og við fluttur Realinum. Øll restin av eginognini stavar frá vinningi av útlánum og virðisbrøvum. Tað er ongantíð fingin ein króna í stuðli frá løgtingi ella landsstýri.

Tey lán, Realurin hevur tikið á lánsbrævamarknaðinum, eru útaftur lánt fyri 1/2% meira enn Realurin rindaði, og rentumarginalurin hevur heilt síðan 1955 verið 1/2%, sum væl kann roknast lagaligt, men við varligari og bíligari fyrisiting verður eisini 1/2% til pening.

Tí er eginognin ídag umleið 490 milliónir krónur. Útlánsheimildin er út frá hesum 2500 milliónir (5 x eginognina), og kann í serligum føri víðkast til 3500 milliónir, men av hesum kunnu einans 147 milliónir krónur lænast út ímóti 2. veðrætti. Lutfallið ímillum hesar 3500 milliónirnar og tær 147 sigur nakað um proportiónssnaringina í tosinum um kappingaravlaging. Tað er hetta sum fær okkum at halda, at farið er langt av leið í metingini um somu avlaging.

Í fyrru helvt av áttatiárunum veittu mangir danskir og útlendskir skipsfíggingarstovnar lán yvir 12-15 ár, Realkreditstovnurin kundi eftir tágaldandi lóg einans veita lán yvir 10 ár, og føroysku bankarnir veittu stórt sæð bert lán móti landskassaveðhaldi. Vinningurin av skipafígging fór tí í stóran mun av landinum - sama veg sum nógv skip seinri - tó at tapini og tapsvandin blivu eftir í Føroyum. Landsstýrið og Realkreditstovnurin fingu tí ílag eina skipan, har landsstýrið veitti lán, sum fingu 1.veðrætt, so hvørt landsstýrið rindaði tey út. Hesi gjaldførislán landsstýrisins vóru soleiðis vard í 1. veðrætti Realkreditstovnsins.

Skipanin var í vavi um 103 milliónir, sum landskassin hevur fingið fulla rentu av - umleið 37 milliónir - og ein stóran part - umleið 30 milliónum - afturgoldnan, meðan tapini hava verið smá. Landskassin hevur sostatt haft hampuligan vinning av skipanini sjálvt í kreppuárinum.

Eftir eru 59,5 milliónir kr. sum eftir lógini skuldu verið heilt afturgoldnar í seinasta lagi í 2010.

Broytingin av lógini um Føroya Realkreditstovn bygdi m.a. á ta sannroynd, at stovnurin við so stórum eginpeningi hevði alt ov nógv fæ liggjandi óvirkið í útlendskum lánsbrøvum og tað tí vildi verið gangligt og forsvarligt við longri áramáli enn 10 ár, og at ofta var trupult at fáa fígging til 80% av skipsvirðinum uppá rímulig vilkor.

Lógin var einmalt samtykt av løgtinginum í november 1998, og veitti Realinum heimild at veita lán upp í 15 ár, og eisini møguleika fyri at veita 2. veðrættarlán í avmarkaðan mun (30% av eginognini).

Síðan Realkreditstovnurin fekk hesa nýggju heimild er tørvurin á gjaldførislánunum burturi. Tað var tí hildið skilagott, at fiskivinnan fekk høvi til at nýta hendan pening, sum álíkavæl var í umfari og útlántur fram ímóti 2010, til at útvega valmøguleikar til at røkka 80% fígging til burðardyggar ætlanir.

Gjaldførislán kunnu bert umleggjast til síðustillað 2. veðrættarlán um Realurin eisini luttekur. Realurin vil hava ein ella fleiri peningastovnar at veita annað/onnur síðustillað 2. veðrættarlán fyri at røkka 80%’um.

Hetta ger, at í minsta lagi ein óheft projektvurdering afturat verður gjørd.

Mælt varð tí til, at gjaldførislánini vórðu „revolverað“ og endurnýtt, í minsta lagi ta tíð, skipanin skuldi verið í gildi.

Hetta var landsstýrisins sjónarmið, sum løgtingið tók einmælt undir við. Atkvøðurnar vóru 31 - 0




Hvat 2. veðrætti viðvíkur, kunnu vit vissa um , at tað eru ikki gjaldførislánini - sum eru minni enn 2% av útlánsheimildum Realkreditstovnsins - ið eru rentuásetandi, tað eru 2. veðrættarlánini frá Realinum og øðrum peningastovnum, sum avgera tørvin og upphæddina. Gjaldførislánini fáa einans júst somu treytir, verandi síðustillað veð.

Vit meta ikki, at her er nakað „subsidiuelement“ ella studningur uppí. Øll 2. veðrættarlánini verða veitt uppá marknaðartreytir. Marknaðartreytir merkja eisini kapping.

Tá vit tala um kappingaravlaging, harmast vit um, at ítøkilig forrættningsviðurskifti ímillum stovnin og einstøk viðskiftafólk eru drigin inn í tjakið. Tað átti at verið møguligt at tjakast um „princippir“ og generel viðurskifti, uttan at draga forrættningsviðurskifti hjá einstøkum virkjum uppá, tí vandi er fyri, at „seriøs“ vinnulívsfólk kveppa seg við at samvinna við „Realin“, skal hendan samvinna sundurgreinast alment. Tá hevur Realinum verið kappingaravlaging fyri.

Varð leitað víðari í útlánsheiminum, fanst okkurt dømi um tilboð um lán heilt niður um 5% í rentu, sum lántakari fekk, vildi hann kvitta við Realkreditstovnin, men tá hetta er skiftandi renta, kemur tað helst aftur um brekku, tí hon hækkar nú ársfjórðing eftir árfjórðing. Realkreditstovnurin roynir framvegis at maximera rentuna yvir meginpartin av lániskeiðinum.

Ein stjóri hevur úttalað seg um vandan fyri, at Realkreditstovnurin ikki fremur nóg neyva kreditvurdering. Svarið kann hóskandi vera tilvísing til eginognina og til tann veruleika, at stovnurin nærum onga krónu hevur mist í 45 ár.

Vit fara ikki út í blaðtjak um okkara virksemi, men fáa vit sakligar spurningar, far spyrjarin altíð nágreiniliga upplýsing. Men vit ætla ikki at umrøða spurningar, sum rættuliga eru innanhýsisspurningar ímillum stovnin og einstøku viðskiftafólkini.

**Niðurstøða okkara er:**

1. Realkreditstovnurin er á ongan hátt alment stuðlaður (ongi subsidier).

2. Vit veita munadygg og góð, men ikki óforsvarlig lán.

3. Gjaldførislánini eru bert endurútlán av eini minni peningaupphædd, sum frammanundan var avsett til skipafígging.

4. Gjaldførislánini fáa júst somu viðgerð sum onnur

2.veðrættarlán, og eru tí ikki studnings/stuðulslán, men marknaðarlán og

5. At alt sum fyriferst er nágreinliga staðfest í føroyskari lóggávu, ið - sum roki omaná í leypinum - var einmalt samtykt av løgtinginum

**Henning Dalgaard**
**Óli E. Heinesen**



## Hygg & Hoyr

**Fríggjadagur 21. januar**

# Náttarravnarnir liva enn

*Umleið tveir triðingar av árinum, munnu tað vera nógvir lurtarar, sum trúfastur hava tendrað útvarpslurtið leygarkvøld, tá náttarravnarnir eru fastir fúsir í útvarpsstovuni*

Jákup Mørk

Hetta hevur verið fastur táttur seinastu átta árini, og annar av vertunum, Heðin Arge Jensen, hevur verið við øll hesi árini. Afturat sær hevur hann so havt skiftandi manning, og seinastu trý árini hevur starvsfelagin iti Rúni Jákupsson.

Rúni greiðir okkum frá, at teir so at siga alla tíðina hava koyrt eftir sama leisti, og hóast teir sjálvsagt hava ymisk hugskot um broytingar, so verður sendingin so at siga hin sama framyvir.

Ein stórur partur av senditíðini er jú avsettur til spurnarkappingina, og tá tað illa ber til at seta eitt fast minuttal á henda partin, er neyðugt at hava tóm pláss í skránni, sum so verða fylt út við tónleiki.

**Væl umtókt**

Ikki tí, júst spurnarkappingin man helst verða ein sera væl umtóktur partur av sendingunum, og hesum dylir Rúni heldur ikki fyri. Talioð á lurtarum, sum royna at koma ígjøgnum at gita, hevur alla tíðina verið sera høgt, so lítið er at ivast í, at hetta er sera populert, heldur Rúni.

Ein partur av vinninginum í spurnarkappingini hevur seinnastu tíðina verið, at ein vinnari, umframt allar smærru vinningarnar, er við í lutakasti um eina ferð.

Seinast hetta varð gjørt, var talan um eina ferð til stóra súrepli »New York«, og nú standa so onkrar konsertferðir á skránni.



Fyri januar mánaða er talan um eina konsert í Keypmammahavn, har heimsgitni walisin, Tom Jones, ger sítt til, at undirhaldið verður á høgum støði.

Mánaðin eftir er aftur talan um konsert við einum væl kendum navnið, sum hevur verið frammi í nógv ár. Hesu ferð er talan tó ikki um ein frekan abba, men hinvegin verður tað tá rock-omman, Tina Turner, sum leggur leiðina fram við danska høvuðsstaðnum.

So er áhugi fyri at sleppa við á hesar ferðir er bert eitt at gera. Ringið 311382 ella…

## ÚTsjón - um loftmiðlar okkara

# Gott vikuskifti



Steintór Rasmussen, lærari, skrivar

Ein gamal kenningur er nú aftur at hoyra í útvarpinum. Og hann skal vera hjartaliga vælkomin!

Kári Sverrisson hevur, saman við Edwardi Nyholmi Debes, átt tann ivasama heiður at leggja sendingar tilrættis, sum føroyingar ikki tímdu at lurta eftir.

Heimskvæðið og Rimmarjazzur høvdu ikki ta stóru lurtarafjøldini. Fólk elskaðu at hata hesar tónleikasendingar. Men hetta skulu vertirnir ikki lastast fyri. Ikki allar sendingar hava eins stóran málbólk. Og skal russisk balalajka ella rimmarjazzur partú rigga til føroyskan millummála og at hoyrast umaftur næsta morgun?

Útvarpið er hetta seinasta árið vorðið betri til at skráleggja. Nýggjar sendingar eru at hoyra, og aðrar eru tiknar av skránni. Soleiðis skal tað nevniliga vera.

Og Edward og Kári eru har framvegis .

Tvey ættarlið spæla tónleik er gott undirhald og Edward er bæði góður og vælkvalifiseraður vertur.

Nýggja sendingin hjá Kára **Tónleikur í trettan øldir** haldi eg var serstakliga áhugaverd og upplýsandi. Ein søgulig lýsing av tónleikasøguni er avgjørt nakað, sum bæði er tiltrongt og forvitnisligt. Og eg haldi eisini at sendingin liggur væl aftaná nátturða mánakvøld.

Hóast nær í slekt við ***Tónasláttturin***, so er hetta neyvan nakar trupulleiki. Hans Egholm eigur tónleikin í 20. Øld…

Eg havi hoyrt tær flestu av hansara sendingum og hóast nokso drúgt er á mál, so haldi eg, at talan er um veruligt pionerarbeiði, sum mong verða glað fyri – ikki minst okkara eftirkomarar. Tað er í slíkum førum, at Útvarp Føroya kann kalla seg fyri mentunardepil.

Sjónvarpið hevði eisini eina herliga sending mánakvøldið.

Tveir gamlir kenningar greiddu frá um **Nuuk**, og tað fólkið ið har býr. Eg legði til merkis, at grønlendingar, sambært Jógvan Vágsheyg, ið koyrdi taxibilin, hildu nógv av føroyska sjómanninum. Javnvágin er ikki altíð so eyðsýniligt, men eg haldi at Jógvan spældi ein positivan leiklut í sendingin, har hann umframt at vísa okkum áhugaverdar partar av býnum, eisini tosaði virðiliga um fólkini, sum búgva har á staðnum.

At **Zacharis Hammer** eisini hitti, ein altíð tíðindafróan, Jan Kløvstad var heldur ikki verri. Samanumtikið er væleydnað lýsing av Nuuk.

Eg lurtaði eina góða løtu eftir Poul Jákup Thomsen, sum sat á **Vaglinum** hóskvøldið. Tað er altíð stuttligt at hoyra beinleiðis útvarp, tá ið meira enn bara tónleikur er á skránni. Hugskotið er, at fólk skulu ringja inn og seta manninum í tí **heita stólinum** spurningar. Bjarni Mohr fylti bíðitíðina út við smápráti og góðum tónleiki og inn ímillum ringdi onkur inn. Poul Jákup var sum altíð hugfarsligur og prátingarsamur. Bert spell at ikki fleiri spurningar komu. Og onkur sum helt seg framat, skuldi kanska heldur havt ringt privat ella til arbeiðsplássið hjá gestinum. Men hugnaligt var tað kortini. Nú vita vit eitt sindur um familjuna hjá Harra Thomsen, hvar hann stendur politisk, og hvørji ljóðføri hann spælir. At tosa við mannin um rúsdrekka og narkotika var ikki so maktpáliggjandi hetta kvøldið.

**Barnaútvarpið mikumorgunin** var nærum í serklassa. Katrin las eina søgu upp fyri tveimum ella trimum børn, sum lurtaða aktivt. Tey livdu seg inn í innihaldið og spurdu spontant um orð tey ikki skiltu ella gjørdu viðmerkingar til tekningar. Upplestarin kom so snildliga ígjøgnum søguna, at ein skuldi trúð, at vit vóru stødd í einum barnakamari og ikki eina studio.

Annars átti 100 ára føðingardagur hjá **William Heinesen** stóran part av vikuskiftinum. Men hvat skuldi verið meiri sjálvsagt.

Hesin andsfríski og gløggi maðurin, sum var so nógv í sama persóni. Rithøvundur, teknari, tónleikari, ummælari, yrkjari, teinkjari, myndahøggari, vínkennari, natúrelskari og helst mangt annað gott.

Í einum lítlum skúri sat William og skrivaði tær mongu ódoyggandi søgurnar, sum framvegis verða týddar til alheims tungumál. Í stuttum kann sigast, at báðir fjølmiðlarnir komu væl frá føðingardegnum.

Men ironiskt nokk fylti okkara kæri speireki og arbeiðssami multi listarmaður 100 ár uttanfyri vanliga arbeiðstíð, so hvør veit um vit fáa ein nýggjan ár 2000 fjølmiðla trupulleika.

ÚTsjón Marna Jakobsen, Steintór Rasmussen, Annika Joensen og Eyðun Joensen skiftast um at skriva ÚTSJÓN